# Eldraráðið 2026 – 2028

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 1 |
| Dagfesting: | 13. januar 2026 kl. 14.30 – 16.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Annemi Joensen, forfólk, Leivur Hansen, næstforfólk, Berljót av Skarði, skrivari, Marjun Poulsen, kassameistari, Johan Carl Dam, nevndarlimur, og Did Nicolaisen, varalimur.

**Fundarskrá:**

1. Viðmerkingar til fundarfrásøgn frá seinasta nevndarfundi
2. Bústaðir
3. Trivnaður
4. Miðlan og gjøgnumskygni
5. Mál at seta á skrá til Býráðið
6. Næsti fundur

AD 1 Viðmerkingar til fundarfrásøgn frá seinasta nevndarfundi

Hetta er fyrsti nevndarfundur hjá hesari nevndini.

AD 2 Bústaðir

- Jóhan Carl legði fyri við uppleggi um hóskandi bústaðir til eldri og fjølbroyttar bústaðarmøguleikar. Bólkurin av eldri og gomlum er ikki homogenur, sostatt er ymiskur tørvur. ER eigur at tala fyri almannagagnligum bústøðum og eigur at kanna møguleikan fyri at gera eitt heildarhugsað eldraøki, har bústaður, røkt og trivnaður er savnað í einum stað. Felagshøli og terapitilboð.
- Gott at gjørt íbúðir og felagshús eins og Tórsbyrgi til eldri á fyrstu tíðini, tú gerst eldri.
- Gott dømi úr Odder í Danmark, har ið eldri og gomul búðu saman í kollektivi. Eisini yngri fólk við børnum. Hvør hjálpti øðrum.
- Hvar verður spurt eftir tørvi?
- 3 trins rakett. 1. Stór hús, 2. Íbúð 3. Røktarheimspláss.
- Flestu fólk vilja helst sleppa undan at fara á røktarheim, men tað kann vera neyðugt. Kundi havt íbúðir og felagsrúm, har ið heimahjálpin var fast til arbeiðis.
- Hvat skal gerast í Nólsoy og í Kollafirði, so at fólk kunnu vera har. Tað er umráðandi at vera í sínum nærumhvørvi.
- Gera fund um hesi viðurskifti við teimum gomlu.
- Eingin grund til at vit uppfinna tann djúpa borðiskin, hvat stendur í nøgdsemiskanningini.

Viðmerkingar/niðurstøða/tilmæli: Vit biðja um upplýsingar frá Býraðnum.

AD 3 Trivnaður

- Nógv fara ikki út, tá ið kavi er. Tey tora ikki út, tað mangla skýli.
- Velja mat sjálvi. Tá ið fólk velja matin sjálvi, er størri sannlíkindi fyri, at tey eta hann.
- Skalvur liggur framman fyri gongubreyt. Aðrastaðni grava fólk sjálvi kava framman fyri sínum húsi ella handli.
- Eldri eiga at gjalda bara hálvan prís t.d. á Tjóðpalli og NLH. Listaleypur til eldri. Stroyming til eldri. Biograf til eldri um dagin.
- Heimarøktin: Ein má nýta sína fakligheit. Tú tillagar heimarøktina eftir fólki, má sansa hvør tørvurin er, so at røktin er persónsstýrd ikki uppgávustýrd. Upplýsingar um heimatænastuna, hvussu er hon skipað, og hvat fevnir hon um? Heita á heimarøktina at koma at hava eitt upplegg fyri okkum.

AD 4 Miðlan og gjøgnumskygni

- Vit skula hava borgara- kunningarfundir.
- Nógv stúra fyri framtíðini.
- Vit eiga at hugsa øll inn. At fólk kunna vera rólig er gott fyri sálarliga heilsu.
- Hava temakvøld, t.d. um tannrøkt. Skeið um dettiteknikk. Gera lýsingar, t.d. á býarbussinum. Kropsliga venjing og medvit. Andaliga føði sum sjónleik og bókmentir.
- Skal ER hava eina telefon?
- Skal ER hava ein meyl?
- Hava FB bólk?

AD 5 Mál at seta á skrá til Býráðið

- Hvørjar langtíðarætlanir hevur Býráðið viðvíkjandi bygging? Er byggingin á Stórubrekku siðbundið eldra- og røktarheim ella hugnaligur eldradepil? Er talan um eldradepil í Kollafirði? Hvussu langt eru tær ætlanirnar komnar?
- Nøgdsemiskanningin

AD 6 Næsti fundur

Nevndin hevur fund annan týsdag í hvørjum mánað kl. 13.00 í fundarhølinum í Tilhaldinum. Næsti fundur verður 10. februar 2026 kl. 13.00.

Fundurin lokin kl. 16.00

Tórshavn 13. jan 2026.

Bergljót av Skarði, skrivari